## Landsstýrismaður hittir Hillary

Grønlendski landsstýrismaðurin í fíggjar- og uttanríkismálum, Per Berthelsen, fer mánadagin til USA, har hann skal hava fund við Hillary Clinton, uttanríkisráðharra. Á fundinum skulu tey bæði tosa um ymisk viðurskifti í tí arktiska økinum, og síðani skulu tey skriva undir ein sáttmála um friðarligt samarbeiði og gransking í økinum, skrivar KNR. Per Berthelsen sigur við grønlendska kringvarpið, at Hillary Clinton hevur víst tí arktiska økinum stóran áhuga, og hann hevur eisini gjørt av at bjóða henni til Grønlands at vitja í næstum, sigur hann.



## Selja gulltenn á alnótini

Prísurin á gulli er hækkaður rættiliga nógv í seinastuni, og tað hevur fingið fólk at selja ymsar gulllutir, og áhugin fyri at keypa hevur víst seg at vera stórur. Tað fær sum vera man eisini gongd á hugflogið hjá seljarunum, so nú eru fólk eisini farin at selja gulltenn, skrivar AP. Á heimasíðuni luxist.com stendur at lesa, at familjufyritøkan Porcello Estate Buyers hevur sett lýsingar á alnótina við fráboðan um, at fyritøkan vil fegin keypa gulltenn. Eitt nú vísir fyritøkan á, at í hesum trongu tíðum kann tað vera eitt gott hugskot at selja gulltenninar fyri at fáa eitt sindur av pengum til gerandisdagin.

# Jekyll and Hyde førdi til Annie

**Jóannes Lamhauge hevði frumframførslu fríggjakvøldið í høvuðsleiklutinum sum Dr. Jekyll and Mr. Hyde. Hann kláraði seg so mikið væl, at hann hevur fingið bjóðað nýggjan leiklut í London sangleikinum, Annie**

LEIKLIST
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*



Føroyski sjónleikarin, Jóannes Lamhauge, kláraði seg væl seinasta fríggjakvøld, tá hann hevði frumframførslu í høvuðsleiklutinum sum Dr. Jekyll and Mr. Hyde. Tilsamans hevur hann saman við leikbólkinum spælt seks sýningar, sum allar hava verið útseldar.

- Tað var fantastiskt at spæla aftur. Eg føldi meg veruliga heima, og gleddi meg til hvørja sýning, greiðir Jóannes Lamhauge frá.

Tað hevur ikki gjørt tað verri fyri Jóannes Lamhauge, at leikurin einans hevur fingið góð orð á vegnum, og at hann hevur sæð ummæli, ið enn ikki eru prentað, har bæði hann og leikurin verða róst fyri flott avrik. Størsta hendingin í kjalarvørrinum av leikinum, er kortini tann, at høvuðsleikarin sjálvur hevur fingið bjóðað nýggjan leiklut í London sangleiki.

- Ein kvinna kom yvir til mín eftir eina framførslu, og rósti mær fyri leikin. Hon segði, at hon hevði hug at bjóða mær ein leiklut, og at eg skuldi frætta aftur frá henni. Stutt aftaná fekk eg eitt tilboð umvegis Facebook. Tey vildu fegin bjóða mær leiklutin sum útvarpsverturin í Annie sangleikinum, sigur Jóannes Lamhauge.

### Lokkandi tilboð

Talan er um sjónleikarafelagið Stage Door Company, sum ynskir at skriva undir sáttmála við Jóannes Lamhauge. Ein av komandi døgunum skal hann taka støðu til hvørt hann skal taka av tilboðnum.

- Tað er sjálvsagt gott fyri cv'ið at vera við í einum slíkum sangleiki. Eg havi eisini summarfrí eftir páskir, og hevði ætlað mær heim at arbeiða. Men nú veit eg ikki rættiliga. Tað er øgiliga lokkandi, sigur hann.

Annie skal sýnast í mai mánaði í London, og kann Jóannes Lamhauge rokna við nógvari ferðing til og úr London. Uppsetingin er ein sokallaður showcase sangleikur, sum verður fíggjaður úr einum enda í annan, og verður tað tískil lønt arbeiði, Jóannes Lamhauge takkar ja til, um hann tekur av tilboðnum.

- Tað er ikki ein høvuðsleiklutur, men ein týðandi hjáleiklutur. Annie snýr seg um foreldraleysu Annie, ið gerst kend umvegis útvarpssending hjá Bert Healy, og tað er altso leiklutin sum Bert Healy, eg havi fingið bjóðað.

Hann leggur afturat, at høvuðsleiklutirnir til slíkar sangleikir altíð verða cast'aðir við sjónleikarum, og at hann tískil kemur at spæla saman við yrkisleikarum í Annie.

### Mekka fyri sangleikarar

Tá Sosialurin tosaði við Jóannes Lamhauge í seinastu viku, hevði hann á orði, at hann ikki hevði roknað við at fáa leiklutin, millum annað orsaka av síni føroysku bakgrund. Men eftir leikin, møtti hann fólki, ið søgdu at tað als ikki hoyrdist at hann ikki var breti.

- Tað er næstan sum at vera ein celebrity her. Eg møti so nógvum fólki, ið rósa mær fyri leiklutin, og bløðini her hava gjørt nógv burturúr sangleikinum. Enn havi eg ikki hoyrt eitt øvugt orð, sigur Jóannes Lamhauge.

Komandi dagarnar fer hann at taka støðu til, um hann skal taka av tilboðnum. Hann er liðugur við Dr. Jekyll and Mr. Hyde, men hevur nógv skúlating at gera. Hann er lesandi á universitetinum í Canterbury, har hann lesur religiónsfilosofi.

- Tað hevði sjálvsagt verið spennandi at takka ja. Men eg veit eisini, at ein karriera innan sangleik í hesum umhvørvinum er ótrygg. London og umráðið, eg búgvi í, eru mekka fyri sangleikarar, havi eg skilt. Uppsetingin av Annie er ein stór uppseting, ið verður frumframd í mai mánaði. Enn veit eg einki um hvussu nógvar sýningar, talan er um ella nakað. Men tað hevði avgjørt verið stuttligt at roynt.